# 8 spurningar um jól

**Bjarni Djurholm**

***Hvat er tað besta við jólum?***
Havi altíð hildið, at jólini eru burturav hugnaligasta hátíðin í árinum. At vera saman við við familjuni, fara í kirkju og annars at njóta friðin og hugnan ger, at man langt undan jólum byrjar at gleða seg til jólar.

**Hvat er tað keðiligasta við jólum?**
Haldi ikki at nakað er keðiligt við jólunum. Hinvegin eru tað tey, sum hava tungar byrðar at bera, sum kunnu hava tað trupult um jólini. Teimum eiga vit at hjálpa og oysa av okkara gleði, so tey eisini kenna jólini sum eina gleðishátíð.

***Hvussu helt tú jól sum barn?***
Helt jól saman við foreldrunum og systkunum við familju. Nógv stákan var við hús. Har var pyntað, bakað osfr., sum hoyrdi jólunum til. Farið varð í kirkju allar jóladagarnar. Serliga minnist eg kirkjugongdina jólakvøld, tá kirkjan var pyntað og livandi ljósini bleiktraðu. Hugnaligar løtur sum festu djúpar glaðar røtur í barnasinnið.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
Saman við konu, børnum og foreldrum við hús. Jólini verða hildin á sama anda, sum tá konan og eg vóru børn. Vit pynta og gera tað hugnaligt við hús. Njóta góðan mat gera dagarnar til jaliga samveru. Vit fara væntandi í kirkju jólaaftan og helst eisini jóladagarnar.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
Desember mánaði er hugnaligur, hóast nógv munnu kenna hann nakað stressutan. Men eg haldi, at tað er sum man ger tað sjálvur. Hinvegin eru tilboðini nærum óavmarkað, jólaborðhald í vikur undan jólum og nógv stákan, sum ger, at nógv munnu kenna mánaðin sera krevjandi. Henda



materialisering og verðslig-gerð í jólamánaðinum ger, at upprunina og orsøkin til gleði-hátíðina fánar, tíverri.

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
Nei

***Keypir tú sjálv/ur tínar jólagávur?***
Ja, keypi eina til konuna. Við-hvørt onkra afturat, um eg komi fram á okkurt serligt, sum eg haldi børnini skulu hava. Annars keypir konan allar gávurnar. Tað dugir hon óføra væl.

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
Havi ikki nøkur serlig ynski, men ein góð bók og okkurt klædna-plaggið er ikki av vegnum. Men stuttligast er at síggja eygnabráðini tá jólagávurnar verða pakkaðar upp, ikki minst hjá børnunum.


























